# Kunngerð

Sum frágreitt i útvarpinum er rakstrar- og kapitalskostnaður elfelagsins nú vorðin so stórur, at neyðugt verður at hækka streymprísin, um roknskapurin ikki skal vísa hall fyri 1976/77.

Galdandi skipan verður eisini tillagað, soleiðis at vanligir brúkarar, ið higartil hava rindað part av nýtsluni í hvørjum bólki, bert skulu rinda í bólkinum samsvarandi ársnýtsluna. Neyðugt verður tí at broyta hitt fasta gjaldið soleiðis: 120-120-180-240 og 300 kr./ár verður broytt til 120-125-235-395 og 755 kr./ár.

Sum dømi taka vit eina ársnýtslu uppá 6000 kWh:

1. 500X0,41 + 4500X0,40 + 1000X0,39 = 2395 + 180 = 2575 kr./ár
2. 6000X0,39 + ............ 235 = 2575 kr./ár

Sum nevnt verður neyðugt at hækka streymprísin, og er samtykt at streymnýtslan skal verða goldin eftir hesari

## Gjaldskrá frá 1. august 1976

**Felagsgjald**
Ljósgjald, húsarhald, virkir/ídnaður undir 30.000 kWh/ár o.a.:

| Ársnýtsla | Streymgjald | Fast gjald |
|---|---|---|
| 0- 500 kWh | 48 oyru/kWh | 120 kr./ár |
| 500- 5.000 kWh | 47 oyru/kWh | 245 kr./ár |
| 5.000-10.000 kWh | 46 oyru/kWh | 355 kr./ár |
| 10.000-15.000 kWh | 38 oyru/kWh | 1.275 kr./ár |
| yvir-15.000 kWh | 36 oyru/kWh | 1.635 kr./ár |

**Kirkjur, gøtuljós o.a.**

| Ársnýtsla | Streymgjald | Fastgjald |
|---|---|---|
| 0- 500 kWh | 45 oyru/kWh | 120 kr./ár |
| 500- 5.000 kWh | 31 oyru/kWh | 310 kr./ár |
| 5.000-10.000 kWh | 30 oyru/kWh | 420 kr./ár |
| 10.000-15.000 kWh | 25 oyru/kWh | 1.040 kr./ár |
| yvir-15.000 kWh | 24 oyru/kWh | 1.250 kr./ár |

**Virkir** við ársnýtslu størri enn 30.000 kWh/ár.

| | |
|---|---|
| Streymgjald | 31 oyru/kWh. |
| Fast gjald | 108 kr./ár |
| Málaragjald | 108 kr./ár |

**Ídnaður** við ársnýtslu størri enn 30.000 kWh/ár.

| | |
|---|---|
| Streymgjald | 25 oyru/kWh |
| Fast gjald | 60 kr./ár |
| Málaragjald | 108 kr./ár |

Henda príshækking er íroknað teimum avgjøldum, ið fólk hava fingið fyri 1976/77.

Higartil er ársuppgerðin bert mótroknað við 11 mánaðum; men er nú ætlanin at mótrokna 12 mánaðar, og verður munurin lagdur aftrat ella drigin frá avrokningunum fyri komandi ár.

Hetta er atvoldin til, at vit í ár hava sent fólki 12 postávísingar.

**S.E.V.**